


# Vencil 9. komin

**BÓKMENTIR** Nú heystfjøllini eru gingin og ásarnir tyngjast við góðum kjøti, so er aftur ein góður og feitur Vencil komin út. Hetta er níggjundu ferð, at Vencil kemur út til føroysku lesararnar

Eirikur Lindenskov

Meðan kjøtið hongur og ræstnar, er gott at seta seg upp afturá og lesa teir framúr góðu og forvitnisligu tesktirnar, sum Vencil borðreiðir við.

Hesin Vencil er tyngdur við dyggum skaldskapi, ið lýsir menniskju, ið onkursvegna hava samband við bygningar av onkrum slag. Ein maður hevur eginleikan at ganga ígjøgnum heilt, ein annar blindur maður teknar eina dómkirkju, tveir brøður rudda av eftir ein føðingardag, eisini eru søgur um bussskýli og morsniglar. Yrkingarnar siga okkum mangt um lívið: um, hvussu tað er, at eiga at hava ein bil, um skógvar, kvinnur, orð, teldur og nógv, nógv annað.

Upprunaføroysku stuttsøgurnar eru samtíðarligar og viðkomandi. Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð hevur skrivað stuttsøguna "Brøður« og Annika Skaalum hevur skriva tvær. Onnur eitur "Bussskýli« og hin eitur "Slímslóðir". Yrkingar eru eftir Berg Rønne Moberg, Ludvík Breckmann, Kjartan Hansen, Jóhannu Thomassen, Oddfríð Marna Rasmussen, Kim Simonsen, Vagn Streymoy, Eir í Ólavsstovu og Katrina Ottarsdóttir. Vencil hevur í níggjunda nummarinum eisini fotomyndir við. Tað er Randi Ward, sum hevur tikið átta portrettmyndir av átta føroyskum rithøvundum.

Týddu stuttsøgurnar eru fleiri og ógvuliga ymiskar. Raymond Carver er við aftur. Hesaferð er tað stuttsøguklassikarin "Dómkikrja", sum Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð hevur týtt. Vónbjørt Vang hevur týtt forvitnisligu søguna "Eitt ljósareytt barn« eftir unga franska rithøvundin Claire Castillon. Hanus Kamban hevur týtt "Múrfarin« eftir Marcel Aymé. Oddfríður Marni Rasmussen hevur týtt ein monolog, ið eitur "Ein telefonsamrøða« eftir Mark Twain. Yrkingarnar eru eftir so mætar høvundar sum Allen Ginsberg, Charles Simic, Charles Bukowski, Harald Landt Momberg og Jim Carroll.

Permuna á Vencil níggjunda hevur Anker Mortensen gjørt. Sum altíð er tað grafiski verkstaðurin, Steinprent, við Jan Anderson og Fríðu Matras Brekku, sum hava prentað permuna.

# Fleiri nýggjar barnabøkur

**BARNABØKUR** Í hesum døgum gevur Bókadeild Føroya Lærarafelags fleiri nýggjar bøkur út

Eirikur Lindenskov




Bøkurnar um Mumi eru ætlaðar teim yngstu børnunum, ið eru 0-2 ár. Øll elska Mumi, so er tað sagt. Við hesum bókum fer barnið á ferð við Mumi út í stóru verð og hjálpir Mumi at telja. Flestu børn eru sera upptikin av at telja. Tá tey fyrst hava lært seg at telja, telja tey alt, sum fyri er.

Peikibøkur við týðiligum myndum og eini einfaldari søgu geva yngstu børnunum nakrar góðar lesiløtur, umframt at tær menna hugflog, forvitni og ikki minst málsliga førleikan. Bøkurnar eru sera væl egnaðar til tey minstu, tí litirnir eru klárir, og myndirnar týðiligar. Næstan alt, sum Mumi ger, eru hendingar, sum barnið kennir aftur frá sínum egna gerandisdegi, og tí kunnu foreldur og børn altíð líta aftur á hendingarnar, sum Mumi var fyri. Og tað er júst tað serliga, sum bøkurnar megna, nevniliga at skapa felags upplivingar fyri alla familjuna.

Tað er Tove Jansson, ið er høvundurin handan bøkurnar um Mumi. Marna Jacobsen týddi. Bøkurnar eru úr hørðum pappi og 14 bls.

## Heystmeldurbók

Heystmeldurbókin er fjórða og seinasta bókin um árstíðirnar. Felags fyri allar 4 bøkurnar er, at tær fara fram í Meldurbýi, og tú fylgir somu persónum. Soleiðis kennir barnið søgurnar aftur, og kann fylgja við, hvussu tað gongur ymisku persónunum. Í Heyst-meldurbókini fortelur Rotraut Susanne Berner aftur nógvar søgur: um gæs, og gamlar kenningar, um eina brúdleypsferð og um, tá eitt burturvilst húsdjór kemur afturíaftur.

Tað, sum eykennir bøkurnar er, at eingin tekstur er at halda seg til. Tí mást tú lata títt egna hugflog, saman við hugflognum hjá barninum, sveima runt á ferðini. Lat myndirnar hjálpa tykkum at gera tykkara egnu søgu. Tað góða við bókum, har eingin tekstur er, er at barnið í størri mun sleppur fram at at tosa og seta sín dám á søguna. Hetta er sera mennandi fyri málsligu menningina hjá barninum umframt at tað lærir at bera sína hugsan fram. Myndirnar eru so rúgvismiklar og søgurnar ymiskar, at tit kunnu nýta nógvar tímar við bókini.

Rotraut Susanne Berner hevur skrivað og myndprýtt. Hon telist millum teir bestu myndprýðararnar í Týsklandi og hevur fingið hópin av viðurkenningum og heiðurslønum fyri síni avrik sum myndprýðari. Umframt meldurbøkurnar er bókin Ævintýrateknirøðir komin á føroyskum. Marna Jacobsen týddi. Bøkurnar eru 14 bls.

## Halastjørnan kemur

Hetta er onnur bókin í klassisku røðini um Mumi. Henda bókin er ætlað teim 6-9 ára gomlu.

Tað er summar í Mumidalinum. Tað er heitt, og Sniff hevur funnið sær eina góða holu. Men um náttina kemur ódnin....Tá mann er lítil, er tað torført at skilja, at rúmdin er kolasvørt og óendalig, og at jørðin bert er ein lítil partur av heildini.

Knappliga – úti í myrkrinum, lýsir eitt reytt eyga, sum veksur í hvørjum. Halastjørnan nærkast Mumidalinum, og fyri hvønn dag sum gongur, kemur hon nærri. Hvat fer at henda? Far við mumifamiljuni á hesa sera spennandi og vandamiklu ferðina.

Tove Jansson (1914-2001) hevur skrivað bøkurnar. Tove var elsta barnið í familjuni. Pápin var myndahøggari og mamman myndprýðari. Tove ynskti altíð at gerast listafólk, og í 1945 gav hon fyrstu Mumibókina út: Småtrollen och den stora oversvamningen. Tað var tó ikki fyrr enn í 1948, tá Tove gav bókina Gandakalshatturin, at hon gjørdist víðagitin. Bókin Gandakalshatturin kom út á føroyskum fyrr í ár.

Karl N. Hansen týddi. Bókin er innbundin og 154 bls.

## Lívið sum Rósa

Endiliga hevur Rósa funnið onkran sum skilir hana. Rósa er farin á skriviðskeið, og har hittir hon Robbi T. Tað kennist heilt óveruligt, tá Robbi T. trínur inn um hurðina. Tá broytist alt. Fyrr helt Rósa, at tónleikurin var tað týdningarmiklasta, men nú skilir hon, at tað er teksturin. Tað sigur Robbi T. í øllum førum, og alt sum hann sigur kennist við eitt sera, sera týdingarmikið. Og Villi er knappliga sera barnsligur.

Lívið sum Rósa. Tú og eg og allur heimurin er framhald av bókunum um Rósu. Bøkurnar um Rósu hava vakt ans í øðrum londum. Umframt film er Lívið sum Rósa eisini vorðin ein filmsrøð og hevur sína egnu heimasíðu. Tað eru høvundarnir Måns Gahrton og Johan Unenge, ið hava skrivað bøkurnar um Rósu. Høvundarnir hava harumframt skrivað teknirøðina um Evu og Adam, sum føroysku børnini kenna frá STROK. Høvundarnir handan Rósu duga sera væl at seta seg inn í kenslur og tankar hjá børnum og tannáringum.

Måns Gahrton er føddur í Svøríki í 1961. Hann er útbúgvin juristur, men er mest kendur sum ein av høvundunum handan teknirøðina Eva og Adam, sum hann hevur gjørt saman við Johan Unenge. Johan Unenge er føddur í 1963 í Stokkhólmi, og hevur saman við Måns Gahrton fingið hópin av virðislønum fyri síni avrik. Jónvá Danielsen týddi. Bókin er innbundin og 128 bls.